# Skerja vælferðina í bestu tíðum í Føroyum nakrantíð

**– Hvat kunnu vit so vænta okkum, tá ið tíðirnar versna aftur, spurdi Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins á landsfundi í Hvalba hetta vikuskiftið**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað krevst ikki stórt hugflog til at verða eitt alternativ hjá sitandi samgongu.

Tað staðfesti Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins á landsfundinum í Hvalba hetta vikuskiftið

Í formansfrágreiðing síni, ásanni hann, at okkurt skilagott er komið á skaftið síðani 1998, tá ið hendan samgongan tók við.

Hann sipaði til undirsjóvartunnilin, nýggja Smyril og samferðsluhavnina á Tvøroyri, nýggju sandoyarferjuna, nýggja vaktarskipið, ætlaða bergholið um Leirvíksfjørð, nýggja Landssjúkrahúsið og miðnámsskúlan í Suðuroy.

– Fyrr var illa, tá vit hugsa um, hvussu góðar tíðirnar hava verið, legði hann afturat.

Samstundis vísti hann á, at samgongustevið er so út av lagi vánaligt, at einhvør onnur samgonga fyri langari tíð síðani var slitnað.

– Men teir siga, at teir kunnnu ikki leggja frá sær, tí ongin er at taka yvir.

Jóannes Eidesgaard helt ikki, at hetta vóru serliga demokratisk sjónarmið, serliga tá ið hugsað verður um seinastu veljarakanningina.

### Nú gránar dagur

Men nú gránar gerandisdagurin aftur, segði formaður javnaðarfloksins.

– Vøksturin í búskapinum er minkandi, og einstakar vinnur eru í kreppu. Og í tinginum er samgongan hamskift afturímóti tá ið hon so hástór skar ríkisstuðulin ein triðing.

Hann nevndi síðani nøkur avriki hjá samgonguni, sum hann helt, vóru eitt inntriv vælferðina hjá fólki:

- Barsilsskipanin verður skorin og útgjaldið minkar.
- Sjúklingar sleppa ikki av landinum til viðgerðar.
- Rætturin til stuðul fyri barnapengar verður skorin burtur.
- Rentustuðul til sethúsaeigarar minkar úr 40 niður í 37%.
- Heimarøktin tekur ikki nýggjar brúkarar inn.
- Landsstýrið turkar útreiðslur upp á føroysku kommunurnar.
- Mjólkaprísirnir hækka fyri aðru ferð innan fyri eitt ár.
- Sjónvarpsgjaldið hækkar 500 krónur
- Avgjald verður lagt á góðgæti, sodavatn og beriposar.

Formaður javnaðarfloksins helt, at tað kravdust ikki serliga stórt hugflog at vera eitt alternativ til slíkan politikk í bestu uppgangstíðum, sum nakar veit um.

– Hetta er nakað av tí, sum hendur, meðan tíðirnar enn eru góðar, so hvat kunnu vit vænta okkum, um tíðirnar veruliga versna, spurdi hann

### Gloyma veruliga málið

Hann segði, at alt hetta hendi, tí at politikkurin gloymir sítt veruliga mál.

– Hjá samgonguni hava tey menniskjansligu virðini minni at týða, tí í berari



*– Sitandi samgongan eigur ikki sita ein dag ov leingi, segði Jóannes Eidesgaard´i formansfrágreiðing síni*

nationalistiskari fáfongd, hevur samgongan frásagt sær rættin til 366 milliónir av ríkisstuðuli um árið.

– Politiska málið gjørdist reindyrkað nationalisma, sum fólk so við og við fara at merkja sviðan av.

Hann helt, at sjálvandi kundi andstøðan latið nú samgonguna stokt í sínum egna feitti, tí betur hevur hon ikki uppiborðið.

– Vit høvdu gingið fram í veljarakanningum, og samgongan hevði farið eftir hæli. Men hetta hevði ikki verið ábyrdgafult ímóti landi og fólki, tí ov nógv virði fara fyri bakka,

– Virði, sum tað hevur tikið ártíggju at vinna okkum, kunnu forfarast eftir stuttari tíð.

– Tí skulu vit, alt tað vit kunna, mæla til, at sitandi samgonga ikki situr ein dag ov leingi, segði Jóannes Eidesgaard.

### Ikki altíð lætt

Annars vísti hann á, hvussu trupult tað mangan er at sita í andstøðu

– Tað er skjótt at fella í ta veitina, at vera eygleiðari og kritikkari til tað, sum samgongan kemur við.

– Tú gerst minni konstuktivur í andstøðu. Og júst hesin leiklutur kann gera, at tú ikki í nóg stóran mun sjálvur setur dagsskránna. Tú verður ov lítið aktivur til at fremja egnan politikk, men velur heldur at leggja alt meira orka í at taka støðu til tað, sum aðrir koma við.

Samstundis vísti hann á, at tað var heldur ikki so lætt hjá andstøðuflokkum at seta dagsskránna.

Skal andstøðan leggja uppskot fyri tingið, hevur hon ikki nakra umsiting ella nøkur embætisfólk, sum kunnu dugna henni í hesum arbeiði.

Hann nevndi dømi um uppskotið um brúkaraverndarlóggávu sum javnaðarflokkurin legði fram.

– Tað var eitt fullfíggja uppskot, sum vit høvdu brúkt nógva orku og pening uppá, m.a. til løgfrøðiliga hjálp, sum vit máttu keypa. Málið fall, og tað visti vit ivaleyst frammanundan.

– So andstøðuleikluturin verður meira ella minni avmarkaður til fyrispurningar og lógaruppskot, sum eru sera einføld og greið, segði Jóannes Eidesgaard.

Kortini hevur flokkurin royunt at seta orð á sín politikk og fyribils eru tríggjar yvirlýsingar gjørdar um politikkin hjá javnaðarflokkinum, ein um miðfyrisitingina, ein um tjóðskaparliga semjuna, og tann triðja, sum er um fiskivinnupolitikkin, verður send út í hesum døgum.

Av øðrum málum, sum flokkurin fer at viðgera og koma við einum ítøkiligum boðum uppá, nevndi hann familjupolitikk, ungdómspolitikk, eldrapolitikk, útbúgvingarpolitikk, umhvørvispolitikk, privatiseringarm útjaðararapolitikk, mentanarpolitikk og kommunupolitikk.

# Meira átrokandi enn nakrantíð at føra ein virknan familjupolitikk

**– Børnnini eru okkara sosiala trygd, var boðskapurin hjá Jóannes Eidesgaard í formansfrágreiðing síni á landsfundinum hetta vikuskiftið**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað ein stór avbjóðing og ein stór skylda hjá politikarum at geva familjunum góð kor at liva undir.

Tað var ein boðsðkapur hjá Jòannes Eidesgaard, tá ið hann helt formansfrágreiðing sína á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum í Hvalba hetta vikuskiftið

– Søgan um føroyska vælferðasamfelagið er eisini søgan um familjurnar í Føroyum og familjurnar eru grundarlagið undir føroyska samfelagnum, segði formaður javnaðarfloksins.

Hann segði, at í menningarlondum eru børnini sosiala trygdin hjá familjunum. Hesi lond hava eitt stórt burðaravlop, og fólkatalið økist støðugt. Trygdin hjá foreldrunum er, at tá tey gerast gomul, hava tey børn, sum kunnu forsyrgja teimum. Til ber at siga, at børnini eru teirra pensión - teirra eftirløn.

Hóast vit ikki beinleiðis hugsa um, hvør skal forsyrgja okkum í framtíðini, er hetta tó nógv meira nærliggjandi, enn vit geva okkum far um.



*– Tvørafólk lurta við áhuga eftir formanninum*

### Støðan ikki so hættislig

Jóannes Eidesgaard segði, at uttan ein støðugan fólkavøkstur - eitt gott burðaravlop, verða færri og færri herðar at bera samfelagsins byrðar. Tey sum bera, verða færri - og tey sum verða borðin, verða fleiri.

– Hetta er veruleikin í okkara grannalondum, og tað er líkt til, at tey fara at verða rakt av teirri nógv umrøddu eldrabylgjuni.

Men støðan í Føroyum er als ikki so hættislig, tí sum tað sær út nú, verða føroyar ikki skolaðar út av eldrabylgjuni.

– Eitt sindur av einari andsøgn at tosa um økta talið av eldrum sum ein trupulleika, tí økingin er jú úrslitið av einum málrættaðum politikki, sum serliga Javnaðarflokkurin hevur ruddað slóð fyri.

Hann sigur, at fyri at fólkatalið í einum landi ikki skal minka, skal landið hava eina sokallaða reproduktiónsratu uppá 2,2, t.v.s. at foreldur skulu í miðal eiga 2,2 børn. Til samanberingar skal nevnast, at í Danmark, Noregi og Svøríki er talið 1,7.

Í Føroyum hava vit higartil verið so heppin at hava eina reproduktiónsratu ímeðal frá 1998 til 2003 uppá 2,47, sum er munandi hægri enn okkara grannar. Men eingi trøð veksa inn í Himmalin. gongdin frá 1970 er, at reproduktiónsratan er støðugt minkandi, hóast vit enn eru á heilt góðari leið.

### Álvarsamar avleiðingar

Jóannes Eidesgaard segði, at eitt minkandi fólkatal kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri ein búskap og fyri eitt land.

– Fellur fólkatalið, kann tað fara at standa á at fáa arbeiðsmegi til tær uppgávur, almennar og privatar, sum samfelagið hevur at røkja. Vit koma tá at merkja eitt afturstig í menningini av samfelagnum.

– Eins neyðugt sum tað er í menningarlondum at fáa fleiri børn fyri at hava eina sosiala trygd, eins neyðugt er tað hjá okkum at gera umstøðurnar hjá familjunum so góðar, at tær vilja hava fleiri børn – tí børnini eru okkara sosiala trygd.

– Tað er tí meira átroðkandi nú enn nakrantíð, at vit fáa ein sterkan og progressivan familjupolitikk, segði Jóannes Eidesgaard.



*Hesir báðir eru gamlir í garði í Javnaðarflokkinum, Sverri Midjord á Tvøroyri, vinstrumegin og Allon Næs í Nesi í Hvalba, hvødu okkurt at práta um*

## Meira í morgin

Í blaðnum í morgin hava vit meiri um landsfundin hjá javnaðarflokkinum, har privatiseringar, eftirlønarskipanir o.a. var á skránni



*Jens Johan Dam, skrivari í javnaðarflokkurin skrivar fundarsamtyktina eftir landsfundin í Hvalba hetta vikuskiftið. Jóannes Eidesgaard, Katrin Dahl Jakobsen og Andreas Petersen hjálpa til við orðingunum*

# Javnaðarflokkurin bóðar seg fram

**– Á landsfundi í Hvalba í dag, staðfestir javnaðarflokkurin, at sitandi samgonga megnar ikki at loysa átroðkandi politisk mál, og tí bjóðar Javnaðarflokkurin seg fram til at taka ábyrgd av landsins leiðslu.**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Á landsfundi í Hvalba um vikuskiftið, viðgjørdi javnaðarflokkurin støðuna í samfelagnum.

Flokkurin staðfesti, at stígur er komin í búskapin og at tað er umráðandi, at røttu stigini nú verða tikin fyri at fáa búskapin aftur á rættkjøl, soleiðis at samfelagið støðugt kann mennast.

– Javnaðarflokkurin mótmælir harðliga ætlanini at leggja fíggjarliga og umsitingarliga tung málsøki undir kommunurnar at umsita, tá ið endamálið ikki tykist at vera nakað annað, enn at spara landskassanum útreiðslur, sigur flokkurin í eini fundarsamtykt, sum varð gjørd á fundinum.

– Javnaðarflokkurin ávarar ímóti, at hetta lætt kann enda við einum nýggjum stættarmuni, har tænastutilboðini verða ymisk um landið.

Landsfundurin álegði Javnaðarflokkinum at steðga gongdini, har støðið verður máað undan samhaldsfasta samfelagnum.

– Landsfundurin krevur, at vunnin rættindi verða vird, og at sjálvsagdar tænastur í vælferðarsamfelagnum verða tryggjaðar øllum borgarum.

### Familjupolitikkur.

Flokkurin staðfestir eisini, at familjurnar eru grundarlagið undir samfelagnum, og at størsta avbjóðingin er tí at geva familjunum góð kor at liva undir. Samhaldsfasta barnsburðarskipanin skal ikki gerast verri – heldur vil Javnaðarflokkuirn virka fyri at útbyggja hesa skipan, soleiðis at tað er gjørligt at verða heima hjá børnum alt tað fyrsta árið.

– Somuleiðis má ein avsláttarskipan fyri systkin í barnaansingini fáast at virka.

Javnaðarflokkurin ásannar somuleiðis, at tað almenna eisini skal verða við í hesum familjuskipanum, tí vit meta, at fyritreytin fyri einum framtíðar vælferðarsamfelag, er, at børnini og tær ungu familjurnar hava eitt trygt fíggarligt grundarlag.

### Bústaðir til tørvin

Javnaðarflokkurin sigur, at tað gerst alt truplari at seta føtur undir egið borð, og at bústaðarmøguleikarnir eru ov einstáttaðir.

– Javnaðarflokkurin vil tí arbeiða fyri, at tað gerst lættari at fáa bústað til tann tørv, sum familjan og tann einstaki hevur, soleiðis at tað almenna gongur undan í at fíggja útbúgvingarbústaðir. ungdómsbústaðir, smærri íbúðir bæði til ungar familjur og eldri. Samstundis eigur áhaldandi at verða arbeitt við at útvega ellis- og røktarheimspláss og búpláss til tey við serligum tørvi.

### Eftirlønarskipan

Somuleiðis harmast flokkurin um, at vit ikki hava fingið eina nýgja eftirlønarskipan enn og at vit ikki hava brúkt tey góðu árini, sum hava verið, til at sett eina skipan á stovn.

– Vit vilja arbeiða fyri, at tað skjótast gjørligt verður gjørd nýggj pensiónslóg, sum kemur at tryggja komandi ættarliðum góð pensiónsviðurskifti.

– Vit vilja arbeiða fyri, at henda pensiónsskipan kemur at hava trý bein at standa á: fólkapensjón, samhaldsfasta og fakfelagseftirlønir. Ein framtíðar pensiónsskipan má byggja á eina breiða politiska semju, og Javnaðarflokkurin er fúsur við opnum sinni at fara inn í hetta arbeiðið.

### Heilsumál

Javnaðarflokkurin frøist yvir, at nýbýgningurin á Landssjúkrahúsinum verður tikin í nýtslu komandi ár, men átalar samstundis, at ov lítið er sett av til viðlíkahald og umbygging, so at Landssjúkrahúsið, sum okkara høvuðssjúkrahús, framhaldandi kann mennast og halda eitt høgt viðgerðastøði.

– Javnaðarflokkurin átalar harðliga handfaringina av serviðgerðini uttanlands, har tað afturvendandi verður sett ov lítið av peningi av, soleiðis at sjúklingar og avvarðandi fáa boð um at viðgerðin verður avlýst ella útsett.

### Útbúgving

Og at enda sigur javnaðarflokkurin í yvirlýsingini eftir landsfundin, at ein góður fólkaskúli er altavgerandi fyri framtíðarmenningina av samfelagnum.

– At børn og ungdómar fáa eina holla undirvísing og uppaling, tillagað føroyska og alheimssamfelagnum, er ein avgerandi fyritreyt fyri, at vit skulu standa okkum í kappingini og alheimsgerðingini.

– Somuleiðis er tað alneyðugt, at ein støðug útbúgving fer fram á arbeiðsmarknaðinum, og at doyur verður lagdur á at útbúgva okkara arbeiðsfólk í fiskiídnaðinum, so vit lúka treytir, sum eitt framkomið vælkvalifiserað matvøruframleiðandi land.

– Landsfundurin staðfestir, at sitandi samgonga við sínum støðugu innanhýsis óemjum ikki megnar at loysa átroðkandi politisk mál, og tí bjóðar Javnaðarflokkurin seg fram til at taka ábyrgd av landsins leiðslu, er niðurstøðan hjá flokkinum eftir landsfundin.